# TRIVNAÐARÆTLAN FYRI EIÐIS SKÚLA

## 2016

# Innihald

Fororð ........ 3
Virðisgrundarlag ........ 4
Ábyrgd og leiklutir ........ 5
  Leiðslan ........ 5
    Flokslærarin ........ 5
  Foreldur og verjar ........ 5
  Næmingurin ........ 6
Foreldrafundir ........ 7
Afturvendandi tiltøk í skúlanum ........ 8
Happingarpolitikkur ........ 9
  Endamál ........ 9
    Hvat er happing ........ 9
    Hvat kann heimið gera ........ 10
    Endi ........ 10
Atferðarreglur ........ 11
  Endamál ........ 11
  Skúlin vil gera sítt besta til at næmingarnir ........ 11
    Reglur ........ 11
    Atgerðir ........ 12
Umsorganarætlan í sambandi við álvarsliga sjúku, vanlukku, deyða ella annan miss ........ 13
  Inngangur ........ 13
  Stuðulsbólkur ........ 13
    Uppgávan hjá leiðsluni ........ 14
  Felags missur ........ 14
  Tá ið næmingur doyr ........ 14
  Doyr næmingur brádliga ........ 15
  Tá ið lærari doyr ........ 16
  Missur hjá tí einstaka ........ 16
  Tá ið næmingurin missir foreldur ella systkin ........ 17
  Tá ið lærari missir børn ella maka ........ 17
  Vanlukka ........ 17
    Bussvanlukka til/frá skúla ........ 17
Samrøðublað til foreldrafundir ........ 19

# Fororð

Í Eiðis skúla arbeiða vit miðvíst fyri góðum trivnaði fyri allar partar. Tí er tað álagt øllum í skúlanum at taka trivnaðararbeiðið og møguligan ágang í skúlanum í størsta álvara.

*Fólkaskúlalógin* sigur í grein 1 stk. 3:

*Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.*

Grein 1 stk. 5 í *Kunngerð um skipan og læring í forskúla* sigur:

*Barnið skal læra at samstarva, fáa møguleika at menna sínar sosialu førleikar, taka avgerðir og kenna samábyrgd av arbeiðinum í flokkinum, virða onnur og duga at nýta meginreglurnar fyri at liva og virka í einum fólkaræðisligum samfelagi.*

Skal tað eydnast at liva upp til hesar ásetingar, er neyðugt, at allar góðar kreftir samvirka í royndini at menna eitt gott og trygt umhvørvi fyri næmingar, starvsfólk og foreldur. Trivnaður heima hevur eins stóran týdning og trivnaður í skúlanum og samfelagnum sum heild.

Endamálið við trivnaðarætlanini er, at næmingar, starvsfólk og foreldur í Eiðis skúla skulu kenna seg væl, vera trygg og trívast. Trivnaðarætlanin skal verða ein hjálp til tess at tryggja trivnaðin í dagliga arbeiðinum og fyribyrgja mistrivnaði. Øll eiga at vera við til at ávirka góða trivnaðin í skúlanum og kenna ábyrgd fyri hvørjum øðrum. Eisini eiga øll at tora at steðga ágangi ella at boða frá, um onkur er fyri ágangi, tí skúlin góðtekur á ongan hátt, at ágangur – happing – verður framdur móti nøkrum í skúlanum – hvørki næmingi ella starvsfólki.

# Virðisgrundarlag

Eiðis skúli byggir sítt virðisgrundarlag á hesi hugtøk:

**Trivnaður – Ábyrgd – Læra**

*Trivnaður* er fortreyt fyri læring. Tí ynskja vit, at næmingar og starvsfólk trívast og kenna seg trygg  í skúlanum.

Ábyrgd av at næmingarnir trívast og læra hava foreldur og starvsfólk skúlans í felag. Vit ásanna týdningin av góðum samstarvi millum heim og skúla.

*Læra* í breiðari merking er endamálið við skúlagongdini. Tí eiga allir næmingar at fáa eina dygga undirvísing.  Skúlin vil virka fyri, at næmingarnir fáa slíkar umstøður, at teir menna síni evni – at virða, – at samskifta, – at kanna og at skapa.

# Ábyrgd og leiklutir

## Leiðslan

Leiðslan í skúlanum hevur ábyrgdina av, at skúlin áhaldandi hevur eitt virkið trivnaðararbeiði.

Leiðslan syrgir fyri, at karmarnir viðvíkjandi ábyrgd og uppgávum eru greiðir. Leiðslan skal vera við til at endurskoða trivnaðararbeiðið. Hetta verður gjørt eftir tørvi, men á hvørjum ári í apríl mánaði luttekur leiðslan saman við førleikastovuni á einum felags fundi, sum hevur til endamáls at viðgera trivnaðararbeiðið sum heild, koma við møguligari nýggjari kunning á økinum og at endurskoða trivnaðarætlanina.

Leiðslan tryggjar, at starvsfólkið er væl kunnað um trivnaðararbeiðið í skúlanum. Leiðslan hevur trivnaðararbeiðið á skrá á námsfrøðiligum fundum í minsta lagi 2 ferðir um árið – á fyrsta námsfrøðiligum fundi eftir summarfrítíðina og á námsfrøðiligum fundi í apríl, har trivnaðararbeiðið og – ætlanin verða endurskoðað.

### Flokslærarin

Flokslærarin hevur ábyrgdina av trivnaðararbeiðinum í sínum flokki og skal samskifta og samstarva við allar viðkomandi partar.

Sum part av trivnaðararbeiðinum kann flokslærarin hava floksfund eftir tørvi. Flokslærarin skal eisini, sum part av trivnaðararbeiðinum, hava næmingasamrøður. Flokslærarin boðar heimunum frá nær næmingasamrøðurnar verða.

Arbeiðið verður gjørt í samráð við hinar lærararnar, sum hava flokkin. Flokslærarin viðger eisini evnið á fyrsta felags foreldrafundi eftir summarfrítíðina. Á hesum fundi verður mælt til, at foreldrini skipa ein trivnaðarbólk/foreldraráð.

## Foreldur og verjar

Fylgja við í tí, ið barnið arbeiðir við, og stuðla tí í arbeiði sínum.

Vísa virðing fyri arbeiði og arbeiðstíð næmingsins, soleiðis at frítíðir, frítíðarvirksemi og annað, verður lagt uttanfyri skúlatíð.

Siga frá um barnið ikki er í skúla.

Foreldur og verjar samstarva við skúlan um reglugerðir, so barnið skilur, at vit draga eina línu. Foreldur og verjar eru góðar fyrimyndir, vísa barninum, skúlanum og ábyrgdarfólki virðing, og krevja at verða vird.

Foreldur og verjar fylgja við, at barnið trívist og boða beinanvegin frá, um illgruni er um mistrivna.

## Næmingurin

Dugir at vera saman við øðrum og at vísa fyrilit. Sýnir fólkaligan og høviskan atburð. Er væl fyri at taka ímóti undirvísing, t.v.s. at hann er úthvíldur og hevur etið – ella hevur ein bita við sær at eta. Møtir til tíðina. Er fyrireikaður, tá hann kemur í skúla. Hevur bøkur og amboð við sær.

# Foreldrafundir

Skúlin hevur minst tveir foreldrafundir í einum skúlaári.

Sí samrøðublað aftast í trivnaðarætlanini. Trýst her!

# Afturvendandi tiltøk í skúlanum

<u>August – desember</u>

Taka upp epli og í tí sambandi gera døgurða til allar næmingarnar

Skúlarenning

Lesivika. Allir næmingarnir lesa t.d. frá kl. 9 til 9:30. Hóskandi um miðjan november.

Allir flokkar hava jólakalendara, sum er klárur 1. desember. Felags morgunmatur og jólahugni er fyri øllum skúlanum.

Jólaverkstøð tveir dagar í desember

Jólaframførsla, vanliga mikudagin fyri jólafrítíðina. Ein á morgni og um kvøldi fyri foreldrum og avvarðandi.

Jólatræ í skúlanum. Vanliga hósmorgun fyri jólafrítíðina.

Jólagudstænasta. Vit bjóða Korndalsgarði og foreldrum við í kirkju.

<u>Januar – juni</u>

Fastalávintshald

Lesi/roknivika

Ítróttadagur – inni

Fara til sang – ella sjónleik

Fáa vitjan av Listaleypinum

Seta niður epli

Svimjitúr til t.d. Klaksvíkar

Útferðir av bygdini. T.d. vitja søvn

Útferð í nærumhvørvinum. T.d. á Breiðásand, Slættaratind, Eiðiskoll o.l.

Evnisviku, sum kann enda við longri útferð.

Ítróttadagur – úti.

Grilldagur

# Happingarpolitikkur

## Endamál

Miðað verður ímóti at lærarar, foreldur og næmingar:

· vita hvat happing er
· eru samd um, at happing ikki verður told
· saman arbeiða móti happing
· vita at vit øll mugu taka ábyrgd, tá ið happing fer fram

### Hvat er happing

Happing er tá onkur, ímóti vilja sínum, ferð eftir ferð í eitt ávíst tíðarskeið, er offur fyri ágangi frá einum øðrum ella frá fleiri persónum.

*Beinleiðis happing kann vera:*

· harðskapur, t.d. eitt skump, eitt slag eitt spark o.l.
· gerðir saman við hóttanum og háðanum
· óunnilig og særandi orð, t.d. munnliga, við sms-boðum ella við chatting
· „útfrysting" frá felagsskapi og bólkum

*Óbeinleiðis happing kann vera*:

· gerðir uttan orð, m.a. herming og ljótt kropsmál
· tilvitað látast ikki síggja persón til tess at særa
· niðurgerandi umtala, ið verður søgd umaftur og umaftur í ávíst tíðarskeið

Havast má eisini í huga at happing fer fram uttan fyri skúlans gátt og í frítíðini m.a. á alnetinum og við sms-boðum.

### Hvat gera vit tá næmingur verður happaður

1. flokslærarin steðgar ítøkiligu happingini, sum fer fram, og tekur sær av tí happaða

2. um happingin heldur fram, tekur flokslærarin saman við flokstoyminum, stig til at happingin verður steðga. Foreldrini verða kunnaði.

3. leiðslan verður kunnað.

*Hvat gera vit tá næmingur happar*

1. flokslærarin steðgar ítøkiligu happingini, sum fer fram og tekur eitt álvarsligt prát við happaran

2. um happingin heldur fram tekur flokslærarin saman við flokstoyminum, stig til at happingin verður steðga. Foreldur happarans verða kunnaði.

3. leiðslan verður kunnað.

*Hvørji onnur tiltøk kunnu setast í verk, um vit gerast varug við happing*

· tosa við happaran, tann happaða og flokkin
· seta happaran og tann happaða saman og tosa við teir
· hava vakin eygu eftir teimum, sum talan er um
· skráseting av gerðum, til tess at gera málini ítøkilig.
· møguliga vísa happaranum úr skúlanum ávíst avtalað tíðarskeið

## Hvat kann heimið gera

Av tí at nógv happing fer fram í frítíðini og uttan skúlans gátt, hevur tað týdning at foreldur eisini seta seg í samband við flokslæraran, skuldi hetta havt ávirkan á skúlagongdina.

## Endi

Vit hava arbeitt eftir teimum tilráðingum, sum Helle Høiby kom við. Hesar byggja á tær kanningar, ið svenski sálarfrøðingurin Dan Olweus gjørdi í 2000.

Seinni hevur eitt annað ástøði viðvíkjandi happing vunnið fram. Hetta er ástøðið hjá Rabøll Hansen (eXbus) frá 2003.

Hetta ástøðið byggir á eina fatan av, at happing er eitt sosialt fyribrigdi, sum stingur seg upp í bólkum undir givnum umstøðum.

Í Eiðis skúla fara vit at samantvinna hesi bæði ástøði, ið royndini at fyribyrgja happing.

Annars verður víst til atferðarreglur skúlans og rundskriv um arbeiðsnáðir og gott skil í skúlanum (dagf. 12. jan. 1994).

Sí eisini faldara um happing Trýst her (pdf fíla),
ella skanna kotuna niðanfyri.

# Atferðarreglur

## Endamál

- At skapa góðar karmar um undirvísingina, sum kunnu virka við til, at næmingar og lærarar vísa ábyrgd bæði fyri sær sjálvum, hvørjum øðrum og skúlanum sum heild.
- At skapa trivna í skúlanum.

## Skúlin vil gera sítt besta til at næmingarnir

- fáa sum mest burturúr skúlagongdini
- trívast og mennast
- uppliva rættvísi og góða viðferð

### Reglur

- Næmingarnir hava skyldu at møta rættstundis, úthvíldir og fyrireikaðir í skúla.
- Skal næmingur hava frí 1-2 dagar, skal flokslærarin spyrjast, er brúk fyri 3-5 døgum skal leiðslan spyrjast. Er tørvur á fleiri frídøgum, skal skúlastýrið hava skrivliga umsókn.
- Er næmingur ikki í skúla, skal skúlin hava boð um fráveruna.
- Arbeiðsfriður og góður atburður verður kravdur í tímunum, eins væl og í fríkorterunum.
- Friður skal vera á gongini meðan undirvísing er.
- Næmingarnir eiga at vísa góðan atburð móti lærarum og næmingum, bæði í orði og gerð.
- Bøkur og annað, sum skúlin eigur, má verða væl viðfarið.
- Skúlin kann krevja endurgjald fyri skaða á bøkur, innbúgv o.a.
- Næmingar skulu ikki hava lutir við sær í skúla, sum kunnu órógva undirvísingina, vera vandamiklir ella vera øðrum til ampa.
- Royking er ikki loyvd í skúlatíðini.
- Næmingarnir skulu vera á skúlans øki í skúlatíðini

## Atgerðir

Um næmingur ikki heldur seg til omanfyrinevndu reglur, tosar lærarin/flokslærarin við næmingin um trupulleikan. Um samtalur, átalur og ávaringar ikki tykjast at hjálpa, og trupulleikin er afturvendandi, verður farið til niðanfyrinevndu stig.

1. Flokslærarin/lærarin tosa við heimið um støðuna. Dagfesting og stikkorð frá samrøðuni, saman við stuttari frágreiðing um trupulleikan verður fest á blað og latin skúlaleiðaranum.

2. Um hetta ikki hjálpir, vísir flokslærarin næminginum til skúlaleiðarans. Skúlaleiðarin minnir enn einaferð á atferðarreglurnar, tosar við heimið og ger vart við trupulleikan. Dagfesting og stikkorð frá samrøðuni verða fest á blað og goymd saman við blaðnum frá flokslæraranum/læraranum.

3. Um hetta framvegis ikki hjálpir, kann skúlaleiðarin vísa næminginum heim í upp til eina viku. Skrivlig grundgeving verður send heiminum.

Annars verður víst til rundskriv um arbeiðsnáðir og gott skil í fólkaskúlanum, dagf. 12. jan. 1994.

# Umsorganarætlan í sambandi við álvarsliga sjúku, vanlukku, deyða ella annan miss

## Inngangur

Okkum, sum dagliga hava við børn at gera, er greitt, at børnini knýta seg tætt at teimum vaksnu, sum eru um tey í gerandisdegnum. Vit fáa at vita um tær stóru hendingarnar, sum hava verið næmingunum fyri, og vit fáa høvi at taka lut í gleði og sorg næminganna.

Tað er lætt, tá ið tað snýr seg um gleðiligar tilburðir í lívi næminganna, men torførari, tá ið tað snýr seg um sorg og syrgiligar tilburðir.

Í dag er eisini alt meiri vanligt, at seta orð á kenslur og fyribrigdi. Um hetta ikki verður gjørt, er vandi fyri, at hetta kann gerast ein forðing fyri menning og læring.

Henda umsorganarætlan skal vera amboð okkara at nýta í teimum førum, har vit hava onkran, sum verður raktur av sorg. Hon skal somuleiðis gera okkum lærarar og starvsfólk á skúlanum tilvitað um tann leiklut, sum vit hava í arbeiði okkara, tá ið tað snýr seg um at hjálpa teimum næmingum, ið vit hava ábyrgdina av.

Endamálið er sostatt, í greiðum orðum at siga, hvussu vit gera, tá ið sjúka, vanlukka ella deyði rakar okkum í skúlanum, ella ein av okkara nærmastu. Vónadi kann umsorganarætlanin lætta um ta truplu støðu vit eru í, tá ið sorgin rakar.

## Stuðulsbólkur

Skúlin skal altið hava ein stuðulsbólk. Í honum sita 2 ella 3 áhugaðir lærarar

Uppgávan hjá stuðulsbólkinum er:

- at virka sum stuðul, har tørvur er á tí
- at taka saman um og eftirmeta tiltøk í árinum sum fór
- at fylgja við hvat kemur út av viðkomandi tilfari og á annan hátt halda við líka og nema sær nýggja vitan um evnið
- at kunna nýggjar lærarar um umsorganarætlanina
- at kunna heimini um umsorganarætlanina

### Stuðulsbólkurin kann

Skipa fyri fundum, fyrilestrum ella evnisdøgum
kunna aðrar lærarar um nýtt tilfar, skeiðstilboð o.l.

### Uppgávan hjá leiðsluni

Hava eina (sorgar)bók, har hendingar verða skrivaðar í, dagfestingar o.s.fr.
Syrgja fyri at flaggið kemur upp
Taka sær av samskifti við fjølmiðlarnar
Senda blómur/krans
Søkja um kreppuhjálp (um neyðugt)

## Felags missur

Hevur næmingur verið leingi burtur vegna sjúku ella annað:

Flokslærarin/toymið tosa saman og tosa við foreldrini fyri at kunna seg um støðuna

Avtala kann verða gjørd við foreldur um kunning inni í flokkinum

Flokslærarin kunnar flokkin  og starvsfelagar

Flokslærarin ella annar lærari, ið er knýttur at næminginum, skipar fyri tiltøkum – t.d. vitjan á sjúkrahúsi ella heima, senda brøv/tekningar/føðingardagsgávu o.l.

Flokslærarin syrgir fyri, at næmingurin verður kunnaður um tað, ið fyriferst í skúla-num, so hann alla tíðina kennir seg sum part av flokkinum

Við hóskandi millumbili kunnar flokslærarin toymið og hinar lærararnar um støðuna

Flokkurin ger tiltøk, tá ið næmingurin kemur aftur t.d. hugnatíma

## Tá ið næmingur doyr

Hevur næmingur verið leingi sjúkur:

Flokslærarin boðar leiðsluni frá og leiðslan kunnar allar lærararnar um støðuna

Flokslærarin/toymið kunna flokkin

Morgunin eftir ella so skjótt til ber kunnar leiðslan allar næmingarnar um hendingina

Saman við kunningini verður møguliga ein andakt - faðir vár, tendra ljós, blómur, tøgn í 1 minutt o.a.

Flaggið verður vundið í hálva stong

## Doyr næmingur brádliga

a.

Tá ið deyðsboð eru, verða flokslærari og leiðsla kunnað

Leiðslan ella flokslærarin seta seg í samband heimið

Leiðslan boðar til fundar, so skjótt boðini koma

Allir flokslærararnir kunna flokkarnar og flaggið verður vundið í hálva stong

Skúlin samlast til andakt sama dag ella dagin eftir

Umráðandi er, at næmingarnir í flokkinum fáa høvi at tosa um hendingina; tí er neyðugt, at meira enn ein lærari er hjástaddur tann dagin. Geva rúm fyri at næmingar kunnu práta, spyrja og vísa kenslur, tímatalvan verður møguliga niðurløgd

Áðrenn næmingarnir fara heim, kann vera neyðugt at tryggja sær, at onkur er heima og tekur ímóti

Flokkurin og skúlin senda krans ella blómur

Flokkurin verður við til jarðarferðina saman við foreldrum sínum

Skúlin verður stongdur undir jarðarferðini og flaggið í hálvari stong

Okkurt serligt verður gjørt við plássið hjá næminginum nakrar dagar ella restina av skúlaárinum t.d. mynd, blomstur, ljós o.a.

Ein limur úr stuðulsbólkinum verður knýttur at flokkinum

Møguliga skriva minningarorð

Føðingar- og deyðsdagurin verða merktir

Vitjan á grøvini

Flokkurin sendir heilsan heim til jóla

b.

Fer hendingin fram í umhvørvi skúlans, skal hjástaddi lærarin seta seg í samband við lækna, løgreglu og leiðslu skúlans.

## Tá ið lærari doyr

a.

Leiðslan setur seg í samband við familjuna ella øvut

Leiðslan boðar til fundar og kunnar allar lærarar og starvsfólk annars

Flokslærarar/toymið fer inn við sínum flokki og kunnar næmingarnar áðrenn øll hittast í høllini til eina minningarløtu

Flaggið verður vundið í hálva stong

Skipað verður fyri minningarsamkomu. leiðsla ella annar lærari/prestur hevur eina minningartalu. Sangur, tala, faðir vár, ljós, tøgn 1 min.

Lærarar fara heim til familjuna

Geva familjuni hjálp, t.d. til jarðarferðina og ervið

Skúlin er stongdur undir jarðarferðini

Minningarorð í bløðini

b.

Fer hendingin fram í umhvørvi skúlans, skal hjástaddi lærarin seta seg í samband við lækna, løgreglu og leiðslu skúlans

## Missur hjá tí einstaka

Tá foreldur/systkin hjá næmingi verða rakt av álvarsligari sjúku ella vanlukku

Flokslærarin ella annar lærari (sum foreldrini føla seg knýtt at) kunnar allar lærarnar um støðuna

Tað hevur týdning, at hinir næmingarnir í flokkinum fáa at vita, hvat er hent. Flokslærarin tekur sær av hesum.

Eisini eigur flokslærarin at gera hinum næmingunum greitt, at næmingurin, ið hevur sjúk foreldur ella systkin, kann hava skiftandi sinnalag/atburð

Flokslærarin kunnar næmingarnar um sjúkuna

## Tá ið næmingurin missir foreldur ella systkin

Flokslærarin ella leiðslan kunnar um allar lærarnar tilburðin

Flaggið verður vundið í hálva stong

Flokslærarin kunnar flokkin um tilburðin

Vera inni í flokkinum, t.d. kann prestur vera hjástaddur

Flokslærarin kunnar tey avvarandi um, at vit tosa um andlátið í flokkinum

Toymið/aðrir lærarar fara heim til familjuna og bjóða sær at hjálpa t.d. til jarðarferðina og ervið

Flokkurin fær frí, meðan jarðarferðin er.

Minningarløta verður hildin í flokkinum

Flokkurin sendir blómur ella krans

Vera um næmingin í tíðini aftaná

## Tá ið lærari missir børn ella maka

Skúlaleiðarin kunnar starvsfólk og næmingar um missin

Flaggið verður vundið í hálva stong

Skúlin skal senda blómur ella krans

Leiðslan og toymi hava ábyrgdina av, at lærarin fær góða móttøku, tá ið hann kemur aftur til arbeiðis

Minnast til, at sorg tekur langa tíð

## Vanlukka

Leiðslan ella flokslærari skal hava boð, um næmingar verða raktir av vanlukku/óhappi, ella hava havt samband við vanlukkutilburð.

### Bussvanlukka til/frá skúla

Leiðslan gevur lærarum skúlans boð um at koma í skúlan sum skjótast. Næmingarnir skulu sum skjótast koyrast aftur í skúlan. Foreldur/verjar fáa boð um at koma í skúlan.

Støða verður tikin til, um prestur, sálarfrøðingur ella onnur skulu tilkallast. Leiðslan tekur avgerðina.

Næmingarnir fara ikki heim einsamallir, men skulu fylgjast við foreldrum ella øðrum vaksnum.

# Samrøðublað til foreldrafundir

## Arbeiðsavrik

| | ☺ | 😐 | ☹ | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg havi míni ting í lagi, tá ið eg møti til tímarnar. | | | | |
| Eg vísi í tímunum, at eg havi fyrireikað meg. | | | | |
| Eg luttaki aktivt í undirvísingini. | | | | |
| Eg fari sjálv/ur í gongd at arbeiða. | | | | |

## Neyvleiki

| | ☺ | 😐 | ☹ | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg møti til tíðina um morgnarnar. | | | | |
| Eg lati uppgávur inn rættstundis. | | | | |
| Eg minnist til bøkur, hefti, seðlar, matpakka, arbeiðsamboð o.a. | | | | |
| Eg eri klár/ur, tá ið tímin byrjar. | | | | |

## Vinarlag og trivnaður

| | 🙂 | 😐 | 🙁 | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg eri mett/ur og úthvíld/ur, tá eg komi í skúla. | | | | |
| Eg dugi væl at hjálpa mínum floksfeløgum. | | | | |
| Eg geri mítt til, at øll í flokkinum kenna seg væl. | | | | |
| Eg órógvi ikki í tímunum. | | | | |
| Eg havi tað gott í skúlanum. | | | | |

## Fríkorterini

| | 🙂 | 😐 | 🙁 | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg órógvi ikki aðrar flokkar á vøllinum. | | | | |
| Eg lati onnur fáa frið. | | | | |
| Eg spæli á ávístu økjunum. | | | | |

## Skúlin og lærugreinarnar

| | | | | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg haldi, at eg dugi væl: | | | | |
| Føroyskt | | | | |
| Støddfrøði | | | | |
| Danskt | | | | |
| Enskt | | | | |
| Kristni | | | | |
| Søgu | | | | |
| Náttúru & Tøkni | | | | |
| Ítrótt | | | | |
| Heimkunnleika | | | | |
| Smíð | | | | |
| Sang | | | | |
| Tónleik | | | | |
| Teld | | | | |
| At samarbeiða | | | | |
| At arbeiða sjálv/ur | | | | |
| Eg vil fegin læra nakað | | | | |
| Eg kundi gjørt meira, ella gjørt okkurt øðrvísi, soleiðis at eg fekk mest møguligt burtur úr skúlanum. | | | | |

## Eg sum vinur

| | ☺ | 😐 | ☹ | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg eri ein góður vinur/ góð vinkona. | | | | |
| Eg lurti eftir øðrum. | | | | |
| Eg eri hjálpsom/ hjálpsamur. | | | | |

## Trivnaður

| | ☺ | 😐 | ☹ | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg trívist væl í flokkinum. | | | | |
| Floksfelagarnir trívast væl í flokkinum. | | | | |

## Eg og tvístøður

| | ☺ | 😐 | ☹ | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg sigi frá, um onkur biður meg gera okkurt, sum eg haldi vera skeivt. | | | | |
| Eg sigi frá, um onkur ger okkurt skeivt móti onkrum øðrum. | | | | |
| Eg biði um hjálp, um eg ella onkur annar hava brúk fyri tí. | | | | |

## Arbeiðslag

| | 🙂 | 😐 | 🙁 | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| Eg vil fegin duga betur og royni at arbeiða fram móti tí. | | | | |
| Eg biði um hjálp, tá okkurt er, sum eg ikki megni – bæði í tímunum og heima. | | | | |
| Eg eri virkin í tímunum. | | | | |
| Eg minnist til at rætta fingurin upp og bíða, til eg verði spurd/ur. | | | | |
| Eg dugi at arbeiða einsamøll/einsamallur. | | | | |
| Eg dugi at arbeiða saman við øðrum. | | | | |
| Eg beri meg høviskliga at móti lærarunum. | | | | |
| Eg eri tilvitað/ur um at vera jalig/ur. | | | | |

Annað:

Umbrot og tilfurframleiðsla: else.fo